VIÐMERKINGAR

# Síðsta hjálandi í Europa

**Mannbjørn J. Jacobsen**

Føroyar er seinasta eftirverandi hjáland í Europa.

Hetta ger at støða okkara verður samanborin við minnilutar, upprunafólk og frumfólk í øðrum londum.

**Politikkarnir meintu tað ikki**

Fólkaatkvøða var í 1946, sum vísti meiriluta fyri loysing, men var hon ikki sett í verk, men uppskotið sum tapti, uppskotið hjá donsku stórnini um Heimastýri, annað av tveimum.

Lóggildið hjá Heimastýrinum var at politikarir aftaná valið søgdu, at teir ongantíð høvdu meint at uppskotið um loysing skuldi setast í verk, vann tað.

Eitt lógarbrot avtrat gav grundarlag fyri at seta tapandi uppskotið í gildi, at kongur upployst løgtingið og undir hernaðarhøttan útskrivaði nýval.

Tá upp var talt aftaná hetta val, hildu teir seg hava grundgeving fyri at strika atkvøðuna í, at flokkar, sum høvdu játta at taka undir við Heimastýrislógina, íroknaður Gamla sjálvstýri, nú høvdu meiriluta í tinginum.

Hendan løgna grundgeving var so brúkt sum grundarlag fyri at flyta inn Heimastýrislógina í 1948.

Óvanligt er at tingmenn meina tað sama sum veljarir í slíkum málum. Til dømis í dag er stórur meiriluti í tingum í Europu fyri ymiskum málum, til dømis EU, men fellur fólkaatkvøða uppskot um luttøku, verður hon fyld.

**Mark fyri Heimastýrislógini**

Heimastýrislógin, sum á henda hátt var ttýst inn á okkum, ger at vónleyst er at finna fram til avmarkingar í lógini.

Hugskotið við at neyðhalda um tapandi uppskotið var jú, at Føroyar vórðu verandi partur av danska statsøkinum.

Okkara støða í danska statinum eru ymiskar meiningar um.

Onkur lýsir okkara støðu sum ein donsk kommuna, sjálvstýrandi eind, partur har serstøk viðurskifti gera seg galdandi.

**“Autonom republik”**

Eitt ein hoyrir er “Autonom republikk”, sum ljóðar løgið, tí Føroyar gjørdist ikki republikk, tjóðveldi, í 1946, sum fólkið ynskti. Orðið er um serstøk øki í forna Sovjetsamveldinum. Til dømis er ein týsk autonom republikk har, sum hevur ávíst sjálvstýri. Hugskotið er, at fólkið skal hava egnu ótálmaða mentan á egna avmarkaða øki, ikki so í Føroyum. Øki er allan vegin umkring fólkað av russum, ikki Føroyar av dønum.

**Politiski og mentunnarligi spurningurin samantvinnaður**

Onkuntíð hoyrir ein at føroyingar hava gjørt skeivt í at samantvinna tað politiska og tað mentanarliga. At krav um politiskt sjálvræði, suverenitet, er knýtt at mentanarmenningini, so seinkað menning á hesum øki útihýsir sjálvstøðu. Hetta er ikki í øðrum londum.

Hetta skal tíðlja hava útihýst framburðskreftum úr tjóðskaparrørsluni, tí tær ikki vóru hildnar at vera tjóðskaparligar.

Í til dømis Írlandi stríddust teir fyri óheftum stati, uttan at krevja enskt ruddað út úr landi teirra og egnað mál ístaðin, høvdu lítlan áhuga fyri tí.

Heft lond í triðja heiminum taka frælsi, í nógvum førum hava tey yvirtikið málið og part av mentanini frá fyrrverandi hjálandaveldinum.

**Atkvøða uttan grund**

Eitt ein ofta hoyrir frá sambandssíðu er, at ein fólkaatkvøða um okkara statsrættarsligu støðu ongan týdning skuldi hava, útlendingar mugu undrast. Hvat var so endamálið við atkvøðuni? Skuldi hon kunna vísa á fólkahugsan, sum ikki skuldi takast í álvara ? Eftir hesi meting skulu veljarir ikki takast fyri fult. Teir siga, at teir skuldu vegleiðast, men at henda vegleiðing, um eftir teirra meting skeiva uppskotið vann, ikki skuldi takast í álvara. Hetta lógloysi og brot á fólkarætt og vanvirðing fyri fólkahugsan byggja tveir føroyskir flokkar á í hvussu so er.

Ein týdningmikil lutur, sum ger hendan atburð møguligan, er spjaðing av føroyingum. Sambandið byggir, sum hjálandaskutilsveinar allastaðir, á minni mennt fólk, øki, bólkar, spjaða ætt uppá henda spurning.

**Keypa føroyingar frá tjóðskaparhugsan**

Ein sálarfløkja, sum sambandsflokkar hava dúva uppá siðani kríggið, sum nú rendi allan føroyska búskapin á heysin, er at vit skullu hava sama sosiala støði, sama livifót sum aðri skandinavisk lond, uttan mun til hvussu hetta fíggjast. Hetta hava teir síðani kríggið gjørt til páskot til at hefta danska statin og Tjóðbankan at føroyska vinnulívinum, ikki sum aðra staðir, at lokka til útlendskan kapital, sum ongin er í Føroyum, á vinnuligum grundarlagi. Hetta ómøguliga renningarlop, siga teir við hvørt skal føra til sjálvstøðu, tá eitt ella annað undarligt hendir.

Óneyðugt skuldi verið at lagt avtrat, at aðra staðir í heiminum samantvinna tey ikki krav um sama livifót, sum mest framkomnu tjóðir í heiminum, við spurningin um statsrættarliga støðu. So vóru ongin lond í triðja heiminum fræls í dag, fleiri stór europeisk lond stýrd av øðrum stati.

Veruliga endamálið við hesum er at við biddarapengi úr Danmark at skapa størri peningaríkidømi millum fólk í føroyska samfelagnum enn í Danmark, lágan inntøkuskatt, so fólk keypist frá slíkum hugsanum.

**Danskar lúnir avgera lagnu okkara**

Tað alt hetta hevur ført til nú, er at danskar lúnir gjørdu, at alt føroyska vinnulívið fór undir hamarin. At vit fáa ein nógv lægri livifót, sum var óneyðugt, sum nú skal til at hála útlendskt vinnulív til Føroya, lokkað av lágum lønum.

Hetta var alt óneyðugt um vit loystu, so fyldi okkara menning tí íslendsku, sum er høgt útviklað vinnulív, góður livifótur, onki arbeiðsloysi, stór virðing í umheiminum. Lagnufundurin millum amerikanska forsetan og sovjetiska á sinni var í Íslandi.

Ongin útlendingur veit í dag at Føroyar eru til, føroyingar verða roknaðir sum danir.

**Statsrættarligar samanberingar**

Vard øki

Ein støða, sum ikki átti at verið frammi sum samanbering, er støðan vard økir, protektoratir.

Hetta eru økir sum eru undir hernaðarligari umsiting av øðrum størri landi, sum so hevur uppgávuna at verja landið móti øðrum størri granna.

Fólk, sum tosa um sjálvræði undir danskari verju eru ikki frammand fyri hesum.

Tað næsta ein her kemur á er bíløgd økir, reservatir. Fólk sum biðja føroyingar fara í føroysk klæði, um teir kenna seg føroyskar, eru inni á hesum.

**ST umboðsøkir**

Eitt slag av vardum øki, sum ikki er samaberiligt við fyrrnevda, er økir undir ST. Hetta er stutta tíð til landið gerst sjálvstøðugt. ST embætismenn umsita landið. Hermen úr ymiskum londum hava vaktartænastu. Ofta er landið høtt av granna, sum krevur økið.

**Triði heimurin**

Samanbering við Triðja heimin er trupul, longu tí øll eru fræls lond í dag. Livifóturin er nógv lægri enn okkara. Búskaparframgondin, sum hevur verið, er eftir at tey gjørdust sjálvstøðug. Mentanarstigið er á lægri støði enn okkara.

Meginparturin av fólkinum er litað, hava egin upprune mál, ofta fleiri í sama landi. Størri ella minni partur er kristin, restin hevur uppruna trúgvir. Í øðrum av hesum londum hevur muhamedstrúgv lutin hjá kristindóminum.

Fólkið dugur í í dag flestu førum eitt europeist mál, tað hjá fyrverandi hjálandaveldinum.

Vanlig samanbering verður ikki her.

**Skipan av gomlum hjálondum Dominions**

Eitt, sum kanska er frammi í huganum hjá onkrum, er dominionsskipanin, hjá fyrrverandi bretskum hjálondum, við stórum parti av fólkinum bretskum, einans enskttalandi. Her er longu ongin samanbering. Tey fingu um aldarskiftið eitt slag av sjálvræði, egin parlamentir, viðtøkufør, egnan her og løgreglu, einans bundin til kongan og skyldu til kríggslutøku um Bretland kom í kríggj.

**Commonwelth**

Hendan støðan, sum longu er sjálvræði í veruleikanum, var skjótt skift til tí støðu, sum enn er, Commonwealth. Hetta er fullkomuliga sjálvstøðug lond, einans knýtt saman av einari personaluunión, ensku krúnuni. Bonduni eru reint mentannarlig.

Gomlu litaðu hjálondini eru í flestu førum undir hesari skipan í dag.

Frakland hevur hesa skipan eisini við fleiri av gomlu hjálondum sínum.

Lítil orsøk er hjá føroyingum at umhugsa skipan, sum í høvuðsheitinum er av lítið framkomnum fólki í Triðja heiminum, um tað ikki er ensktalindi lond har nógv størsti parturin av fólkinum er eftirkomarir av bretskum niðursetumonnum, sum enn hava valt at verða undir bretsku krúnuni.

Aðrar samanberingar kunndu sjálvandi takast fram, men líkjast tær, ella eru ov langt av leið.

**Vinning av egnu umboðan**

Lata føroyingar seg lokka til eina av síðstnevndu skipanum, fáa vit støðugt stóra trupuleikar við egnu umboðanum.

Umheimurin vil enn kenna okkum sum part av Danmark.

Tær umboðanir vit so skulu hava verður støðugt stríð um, eisini fer hugsanin um neyðturvuleika at koma í vegin.

Vinningur av egnu umboðan gerst nógv minni, ofta sum partur av donsku, enn um vit koma í vanliga sjálvstøðu.

## Sjáldsamt leiðaraskeið í Føroyum



Fyri skjótt tveimum árum síðani varð ein sokallaður »Chapter« undir »Full Gospel Business Men’s Fellowship International« (FGBMFI), stovnaður í Havn. Stovnararnir vóru ein flokkur av monnum frá ymiskum yrkjum og samfelagstilknýtum.

Felagsnevnarin hjá FGBMFI-luttakarum er trúgvin á teir bíbilsku sannleikarnar, ikki bert sum grundarlag undir teirra egna lívi, men eisini í vinnulívinum og yvirhøvur í samfelagslívinum.

Á hesum grundarlagi bjóðar FGBMFI kvinnum og monnum til skeið í Havn komandi fríggjadag seinnapart og leygardag fyrrapart. Evnið á skeiðinum er:
LEIÐARAVENJING - GRUNDAÐ Á SANNLEIKAR BÍBLIUNNAR.

Millum umrøðuevnini kunnu nevnast:
Støðið undir leiðslu
Lyklarnir til drívkreftir menniskjans
Starvsfólkastrategisk alliansa
Røttu persónar á røttum støðum út frá natúrgivnu eginleikum

Umrøðuevnini verða lýst út frá tí, ið Bíblian sigur. Rúm tíð verður givin til samskifti av sjónarmiðum og royndum innan tey einstøku økini. Leiðaraskeiðið er fyri øll, ið tekna seg, so leingi pláss verður.

Tað var hin amerikanski mjólkavirkisframleiðarin Demos Shakarian, sum fyrst í fimmtiárunum stovnaði FGBMFI. Høvuðsbygnaðurin í arbeiðinum vóru MORGUNMATAMØTINI, har limirnir bjóðaðu arbeiðsfeløgum sínum og øðrum kenningum frá gerandislívinum við. Her greiddu teir hvør øðrum frá praktiskum tilburðum úr gerandislívinum, har trúgvin á innihald gleðiboðskaparins var miðdepilin. Morgunmatarnir vórðu sum oftast fyriskipaðir á hotellum, resturatiónum og kaffistovum, har allir kundu kenna seg »heima«.

Rørslan hevur breitt seg kring alla heim. Hvørja viku savnast hundraðtúsundtals menn við tí endamáli at bera teim innbodnu og hvør øðrum fram vitnisburð um lívið saman við Kristusi.

Í sambandi við Leiðaraskeiðið her í Havn, verður leygarkvøldið skipað fyri døgurða (Galla dinner) á Hotel Hafnia við sangi og vitnisburði. Eins og Leiðaraskeiðið, er døgurðin eisini fyri allar, ið tekna seg, annaðhvørt teir eru einsamallir, saman við hjúnafelaga, vinum, familju ella kenningum.

Orðið Buisness Men í heitinum FGBMFI-felagskapinum má skiljast við støði í tí amerikanska týdninginum av hugtakinum. Á føroyskum hevði »gerandisdagsins menn« verið ein nøkulunda røtt týðing. Hetta snýr seg sostatt um púra vanlig menniskju, sum nógva av tíð síni eru upptikin við at vinna til »hitt dagliga breyðið«. Tað merkir, menniskju, sum hava nógv um at vera í gerandisdegnum, men sum hóast tað, kenna ein longsil eftir djúpari meining í lívinum. Allir, sum kenna tað soleiðis, eru vælkomnir gestir til døgurðan og luttakarar á Leiðaraskeiðinum sigur Mads A. Winther formaður í FGBMFI-Føroyar.



# Væleydnað oljuráðstevnuni í Aberdeen

**Allir partar, bæði tær føroysku fyritøkurnar, oljuoperatørarnir og undirveitarnir hjá oljuoperatørunum vóru væl nøgdir við oljuráðstevnuna í Aberdeen**

Oljuráðstevnan varð hildin hósdagin í síðstu viku. Fyrrapartin greiddi oljuoperatørarnir frá, hvat teir kravdu av undirveitarunum í sambandi við Føroya økið. Og boðskapurin var klárur: undirveitarnir skuldu geva føroyskum fyritøkunum veruligan møguleika at sleppa uppí part í oljuvinnuni, skrivar Vinnuhúsið.

### Koma til Føroya

Seinnapartin høvdu føroysku fyritøkurnar møguleika at møta undirveitarunum. Allir teir týðandi undirveitarnir, sum koma at arbeiða í føroyskum øki, vóru hjástaddir. Og sum skilst á føroyingunum so var boðskapurin um føroyska luttøku í fleiri førum hoyrdur. Undirveitarnir vóru blíðir og fyrikomandi og vístu veruligan áhuga.

Millum annað hava tveir teir størstu undirveitarnir Halliburton og Schlumberger nú ætlanir um at koma til Føroya at vitja í næstum fyri at kunna seg um Føroyar, kanna hvørjar fyritøkur eru og at hyggja eftir infraskipanini. Hesar ætlanir høvdu teir ikki áðrenn ráðstevnuna.

Nú hava føroysku fyritøkurnar møtt undirveitarunum. Nú byrjar so tað meira harða arbeiði, at fáa sáttmálar í hús, skrivar Vinnuhúsið.

# Veitaraskrá sett í verk

**Í Aberdeen hósdagin var m.a. kunnað um nakað av tí, sum er komið burtur úr samstarvinum millum oljubólkin hjá Arbeiðsgevarafelagnum og oljufeløgini seinastu mánaðarnar. Ein veitaraskrá innan oljuvinnuna á føroyskum øki er ein partur av hesum**

Feløgini sum á sumri fara undir boringar á landgrunninum hava tørv á nógvum ymiskum veitingum og tænastum - alt frá vanligum vørum til frálanda tænastur, ið krevja serkunnleika og royndir.

Nógvar av veitingunum kunnu verða veittar av føroyskum virkjum, men tørvur er á, at oljufeløgini og undirveitarar teirra hava kunnleika til føroysku vinnuna og hvat hon kann bjóða.

Av hesi orsøk hevur oljubólkurin hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag roynt at finna bestu loysnina fyri føroyska vinnu viðvíkjandi skráseting í einum veitaragrunni. Og stutt fyri ráðstevnuna hósdagin var komi á mál, skrivar Vinnuhúsið.

### Góða loysn

Semja er gjørd millum Arbeiðsgevarafelagið og oljufeløgini um eina loysn sum tryggjar fleiri endamál: - Oljufeløgini og undirveitarar teirra fáa neyðugt innlit í føroysk virkir og tænastur teirra. Føroysk vinna fær kunning um allar veitingar sum oljuvinnan hevur tørv á og føroysk vinna fær at vita hvørji virkir hava fingið einstøku veitingarnar

Skipanin tryggjar sostætt holla kunning til allar partar, og at gjøgnumskygni verður innan oljuvinnuna.

### 1. mai

Tað verður Vinnuhúsið sum kemur at umsita skipanina, og hava kontaktina við føroysku virkini sum verða skrásett og útlendskar fyritøkur sum gerast haldarar av skipanini. Oljufeløgini koma saman við føroyskari vinnu at mynda ein stýringsbólk, sum eftir tørvi skal viðgera skipanina og møguligar tillæðingar av henni.

Tekniski parturin av skipanini verður gjørdur í samstarvi við Fyrst Point Assesment og Joint Quality scheme, ið reka tilsvarandi skipanir í Bretlandi, Noreg og Danmark. Ætlin er, at skipanin skal verða klár at byrja 1. mai.

Á kunningarfundi fyrst í apríl fer Arbeiðsgevarafelagið at greiða oljuáhugaðum virkjum nærri frá skipanini og hvørji skrásetingarkrøv verða sett til føroyska vinnu, skrivar Vinnuhúsið.

# Fundur um økismenning á Sandi

TÍÐINDASKRIV

Sandoyar Sýslu Vinnuráð skipar fyri almennum fundi um økismenning mikukvøldið 21. mars kl. 19.00 á Virkinum á Sandi, har umboð fyri politisku flokkarnar luttaka.

Fundurin verður skipaður á hendan hátt:

***1.*** Eitt umboð fyri hvønn politiskan flokk fær høvi at svara spurningum, sum eru settir frammanundan. Umboðini fáa í mesta lagi 10 min. í part.

***2.*** Sakkønir frá Granskingardeplinum fyri økismenning í Klakksvík, seta umboðunum fyri politisku flokkunum spurningar.

***3.*** Umboðini fyri politisku flokkarnir svara spurningum frá teimum sakkønu.

***4.*** Fundarsalurin fær høvi at seta umboðunum fyri politisku flokkunum spurningar.

Politisku flokkarnir verða umboðaðir soleiðis:
Fólkaflokkurin - Eyðun M. Viderø
Sambandsflokkurin - Javnaðarflokkurin - Jóannes Eidesgaard
Sjálvstýrisflokkurin - Sámal Petur í Grund
Tjóðveldisflokkurin - Páll á Reynatúgvu
Miðflokkurin - Jenis av Rana

Teir sakkønu frá Granskingardeplinum fyri Økismenning verða:
Ólavur Waag Høgnesen
Bjarni Mortensen

Fundarstjóri verður Hilmar Jan Hansen, útvarpsmaður



VIÐMERKINGAR

## Eingin áhugi fyri Rás Klaksvík

**Marita Matras,**
*Klaksvík*

Eg skrivaði herfyri eitt stutt lesarabræv um, at Klaksvíkar kommuna átti at skipa soleiðis fyri, at klaksvíkingar fingu felags fylgisveinasjónvarp, ístaðinfyri at fólk í hvør sínum lagi seta parabolir upp.

Eg fekk ikki nógvan respons uppá hetta brævið. Onkur býráðslimur hevur smílt til mín, og hevði tað verið val, høvdu teir ivaleyst eisini komið at práta.

Eg kundi hugsað mær, at býráðið tók hetta málið upp, tí tað hevði verið ein stór tænasta til borgarar í Klaksvík, at teir sluppu at velja ímillum fleiri rásir, uttan at seta eina óprýðiligar parabol upp, soleiðis sum so nógv hava gjørt.

Tað hevði eisini verið ein tænasta, sum hevði givið borgarunum kensluna av, at teir veruliga fáa nakað fyri skattapeningin.

Eg gjaldi 1500 krónur um árið til Sjónvarp Føroya, men eg gleði meg til at kunna skifta millum fleiri rásir.

## Betri lívskvalitet, betri arbeiðskvalitet, betri heilsu?

TÍÐINDASKRIV

Hvat kanst tú sjálv/ur gera fyri at fáa tað góða lívið? Og tað góða arbeiðið?

Hvussu kanst tú fyribyrgja sjúkum, og halda teg unga/n, fríska/n og altíð vera sum fyrstan dagin, í “vigør”?

Jú, svarini ber til at fáa á einum vikuskiftisskeiði í Havn tann 24. og 25.mars, tá kendi danski læknin og granskarin Søren Ventegodt, á Forskningscenter for Livskvalitet, kemur til Føroya.

Søren Ventegodt undirvísir í tí nýggja rákinum í læknavísindini, sum leggur størri dent á upplivingar enn á objektivar faktorar, sum leggur størri dent á fyribyrging enn á viðgerð.

Hann tosar um lívskvalitet, hvat lívskvalitetur er, og hvussu vit brúka okkum sjálvi privat og professionelt, so vit gerast rættiliga virðismikil fyri okkum sjálvi og fyri onnur.

Høvuðstema er tín egna, persónliga lívsfilosofi - títt lívsperspektiv, sum kann vera meira ella minni positivt, meira ella minni í tráð við lívið. Hava vit ein vánaligan lívskvalitet, kemst hann aloftast av grundleggjandi áskoðan okkara á lívið. Ein áskoðan, sum kann betrast.

Og tá vit betra lívskvalitetin, gerst heilsan eisini betri. Hetta kalla vit holistiskt medisin. Tað er tikið úr grikskum: holos = heildin ella sálin.

Tí byrjanarstøðið er júst heildin í øllum lívi okkara, tað, sum vit plagdu at kalla sálin.

Søren Ventegodt byggir á og vísir á nýggjar læknavísindaligar kanningar í USA, og á egna filosofiska og vísindaliga gransking.

Søren Ventegodt hevur skrivað tíggju bøkur um tað góða lívið, tað góða arbeiðið og ta góðu heilsuna.

Bøkurnar hjá honum eru á donskum, svenskum, norskum og á enskum. Onkrar teirra eru á bókasøvnunum í Havn.

Meira fæst at vita á heimasíðuni hjá Forskningscenter for Livskvalitet www.fclk.dk <http://www.fclk.dk>.

Skeiðið kostar 1800,00 kr. - konto í Føroya sparikassa 1355223, og tey, sum hava hug at vera við, kunnu boða frá á tlf 317305 ella 311510 ella 221959 í seinasta lagi fríggjadagin tann 16. mars.